Ranitsky sigur: "At góður tekstur – í bundnum ella óbundnum máli - skal innihalda nakað av filosofi (læru og innihaldi) og hava ein kulinariskan ráka (smakk). "Ella, sum tann lærdi Paul V. Rubow, í mong ár professari í litteraturi við Københavns Universitet, eisini heppið hevur borið fram: "Orðini skulu kunna spæla saman – skulu kunna "snodda" til hvørt annað."

Minningarorðini, sum finnast í fyrstu bókini í bókarøðini: "Frá penni Petur W. Hábergs" um t.d. Gunnhildur Evensen, dóttir próstin A.C. Evensen, ið varð tann fyrsta gentan úr realklassa teirra sum doyði, er ein sterk lýsing í serklassa, og sum kundi - og átti - at staðið í føroysku lærubókunum í skúlum landsins.

Petur var skald og kundi sum fáur fanga orð og máliskur – og brúka tær aftur og aftur í øðrum samanhangi og vendingum. Og hóast framfýsin, opin og ljóðkátur av lyndi – so fekk hann seg hinvegin t.d. ongantíð til á møtum at geva ein sang út, sum hann sjálvur var upphavsmaður til.



Petur lesur úr Bíbliuni á ferð í ísrael

## Røðarin

Sum talari var hann sera vandin. Hann segði, at hevði ein talari so at siga "viðtikið" fyri sítt egna viðkomandi, at hann var góður røðari, og tí altíð kundi halda seg framat til at taka orðið, ja, so var hann longu "ferdigur" sum talari!

Um talur, sum byrjaðu væl, men endaðu onkursvegna út í tóman heim - uttan greiðan boðskap ella poeng - kundi hann viðhvørt brosandi físa at:"- ein elefanta-tala!".

Við eina "elefanta-talu" meinti hann, at tað var, táið talarin hevði ein spennandi og liðiligan inngang (sum snápulin á elefantinum, ið kann liðast og brúkast og ferðigur kann fara allar vegir), síðani kemur "innihaldið" - eitt veldigt høvd og oyru og síðani ein gevaldigur kroppur á fýra betongsúlubeinum. Men, táið takast skal samanum, og endaligi boðskapurin skal hvessast og koma greitt fram, tá gerst hetta oftani bara til ein "elefanta-hali", og sum ein endi á taluni als ikki hóskar til tað vektiga innihaldið – ein ússalig slintra av einum hala, sum tann skirvisligi endin á einum av heimsins allar størstu djórum(!).

## Hugbirtingar

Vit ungu tá merktu væl, at Petur metti kynstur, kunst og neyva vitan høgt; men kundi hinvegin í sínum talum lættliga syfta upp úr skjáttuni eina hugbirting sum hesa: "Tit ungu, ein kann



Hjørdis og Petur W. Háberg á yngri árum

bæði vera *doktari og professari í teologi*, og tó ikki *eingang* at hava forstaðið *kristindómsins ABC*!"

Tílíkar breiðsíður vóru vituliga vendar móti tí - enn ikki ókenda – "akademiska" hugmóðinum, sum ikki sørt pátikið velur at lyfta seg upp um eitt bládýpiskent evni og - erkvisið og fýlandi - skoða út yvir Bókanna Bók líkasum frá í erva av, og kanska, táið av tornar, hevur hesin "køni" als ikki hevur sæð skógina fyri berum trøum! Men hevur heilt einfalt gjørt seg sjálvan til "leirkerasmiðin" – heldur enn til leirið sjálvt, sum Meistarin sjálvur kann mynda - - (Jer. 18,1-6 og Róm. 9,21).

Nei, kundi Petur siga: "Nei, tá vil eg nógv heldur lurta eftir tí, sum samtíðarmaðurin og samverkamaðurin og fiskimaðurin Pætur ápostul segði um vin og Harra og Meistara sín – heldur enn eftir tí, sum professor: "datt ella ditt" sigur um "hatta ella hitt" – og ofta eitt nú og eitt annað tá - táið tað snýr seg um: Hitt Æviga Orð Lívsins!"

## Vinmenn og vitar

Eisini sigur tað nakað um Petur W. Háberg, at millum teir persónarnar, ið hann kendi, helt av og ofta tók til - og sum her bara eru nevndir eftir aldri - vóru : Jóannes Patursson (1866-1946), Tom Nicolajsen (1877-1950), Jens av Reyni (1886-1948), Victor Danielsen (1894-1961) og Andrew W. Sloan (1896-1973) – og so ikki sørt til skyldmannin Christen Holm-Isaksen/Kristin í Geil (1877-1935) eisini.

Nú til jóla seinast kom tann næsta bókin í røðini - av og um - Petur W. Háberg. Bókin kundi




Gamla Ebenezer í Havn sum var tikið niður fyrst í sekstiárunum

eins og tann fyrra - í trá við ans og anda Peturs - verið bæði neyvari redigerað í teksti og verið fjølbroyttari í myndavali, men har er tó væl í heinta - fyri bæði leik og lærd.